gult6 cyan6 magenta6 svart6

Ósemjan um Teistan:

Ongir pengar á muni

–Tað, sum ósemjan um Teistan er um, er so lítið í pengum, at eg skilji ikki, hví málið ikki er loyst, sigur formaðurin í Skipara- og Navigatørfelagnum. Í Fíggjarmálastýrinum eru tey ikki samd

ÓSEMJA
Áki Bertholdsen

Formaðurin í Skipara- og Navigatørfelagnum , Ellintur Abrahamsen, skilir ikki, hví ósemjan ikki er loyst enn.

– Tað, sum vit eru ósamd um, er so lítið í pengum, at eg skilji ikki, hví málið ikki er loyst enn, sigur hann.

Hann sigur, at orsøkin til ósemjuna er, at kravt verður, at tað skulu vera tveir stýrimenn við Teistanum, men á hinum bátunum er bara ein.

– Tað er hesin eini stýrimaðurin, sum skal umborð eyka, sum skal bólkast í ein lønarflokk.

Í løtuni er skiparin í lønarflokki 6 og skiparin í flokki 8.

Men skal ein stýrimaður afturat umborð, skal hann í ein lønarflokk. Vit hava tí skotið upp, at at yvirstýrimaðurin fer í lønarflokk 8 og skiparin í flokk 9.

Í løtuni er byrjunarlønin í 6. flokki 18.942 krónur um mánaðin og endalønin er 20.533 krónur. Í Lønarflokki 8 er byrjunarlønin 20.334 krónur og endalønin 21.614 krónur. Og í lønarflokki 9. er byrjunarlønin 22.101 krónur og endalønin 23.193 krónur um mánaðin.

Sostatt sæst, at tað, sum skilir partarnar, hevur lítlan og ongan, fíggjarligan týdning, men hetta vil Fíggjarmálastýrið ikki góðtaka.

Hjá maskinmeistarunum er trupulleikin ein annar. Hjá teimum er ein orsøk til ósemjuna, at Teistin hevur dieselelekriska útgerð og krevur tí størri førleika av maskinmeistaranum.

Í Fíggjarmálastýrinum eru tey ikki heilt samd.

Har siga tey, at Teistin er bólkaður saman við Dúgvuni og, men at Skipara- og Navigatørfelagið vil hava hann flokkaðan hægri enn Dúgvan, hóast Teistin er minni og tað hevur einki ein fíggjarligan týdning.



Tað skulu tveir stýrimenn vera við Teistanum, og tað er trupulleikin, tí hann skal setast í ein lønarflokk, sigur Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og Navigatørfelagnum

Hava fullan rætt at leggja Teistan

Tað var eitt álvarsligt bakkast fyri fíggjarmálastýrið og Strandferðsluna, at fútarætturin ikki vildi ganga teimum á møti og enn røkist onki fyri, at nýggja sandoyarferjan, Teistin, sleppur at loysa

Tað er ongin sáttmáli á økinum og tí hava Skipara- og Navigatørfelagið fullan rætt til at leggja nýggja Strandfaraskipið, Teistan, sigur Fútarætturin

ÓSEMJA
Áki Bertholdsen

Enn røkist onki fyri, at nýggja sandoyarferjan, Teistin, sleppur í sigling.

Nú Fútarætturin hevur gjørt av, at Skipara- og Navigatørfelagið hava fullan rætt at nokta sínum limum at mynstra umborð á Teistanum, er onki til at taka, uttan at taka samráðingarnar upp aftur beinanvegin.

Tað var Fíggjarmálastýrið, sum heitti á Fútarættin um, at døma tiltøkini hjá Skipara- og Navigatørfelagnum og Maskinmeistarafelagnum at vera ólóglig.

Tey bæði feløgini hava noktað limum sínum at mynstra við nýggja strandfaraskipinum tó ósemja er um lønina hjás yvirmonnunum.

Men Fútarætturin kom til ta niðurstøðu, at tað hava feløgini fullan rætt til.

Tað er nú hálvur annar mánaði síðani, at Teistin var klárur at seta í sigling. Men higartil hevur ósemja ímillum Skipara- og Navigatørfelagið og Maskinmeistarafelagið øðrumegin og Fíggjarmálastýrið hinumegin um lønina hjá yvirmonnum forða fyri, at hann sleppur í sigling og hetta fer meiri og meiri at líkjast eini endurtøku av søguni um nýggja vaktarskipið, Brimil, sum lá við kei í fleiri mánaðir av somu orsøk.

Byrja umaftur

Leiðarin á Lønardeildini í Fíggjarmálastýrinum, Tummas Magnussen, hevur ongar viðmerkingar til málið og tað eydnaðist ikki at fáa fatur á landsstýrismanninum sjálvum, Karsten Hansen.

Men við sjónvarpið hóskvøldið segði hann, at hann nú fór at kalla partarnar saman aftur at vita um tað ber til at finna eina loysn. Tað skiltist kortini á honum, at bjartskygnið var ikki stórt, tí tað hava longu verið nógvir samráðingarfundir, uttan at nakað var komið burturúr.

Men seint í gjáramorgunin, hevði Skipara- og Navigatørfelagið ikki fingið fundarboð.

Men Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og Navigatørfelagið, sigur, at niðurstøðan hjá Fútarætturin kann býtast sundur í tvey.

– Fútarætturin sigur í fyrstu atløgu, at Fíggjarmálastýrið er ikki partur í málinum, tí tað er ikki arbeiðsgevari hjá yvirmonnunum á Teistanum. Tí vísti rætturin kæruni frá Fíggjarmálastýrinum frá sær. Arbeiðsgevarin hjá manningini er Strandferðslan, men talan er ikki um eina rættarósemju og tí vit hava ikki brotið nakra lóg. Talan er um eina áhugaósemju, tí ongin sáttmáli er á økinum og sostatt hava vit fullan rætt at nokta okkara limum at mynstra við Teistanum, sigur Ellintur Abrahamsen.

Fútarætturin vísti sostatt málið frá sær, tí talan var um eina áhugaósemju og ikki eina rættarósemju. Og Fútarætturin kann bara taka støðu til eina rættarósemju.

Sostatt halda tiltøkini hjá Skipara- og Navigatørfelagnum og Maskinmeistarafelagnum, fram.

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg

gult7 cyan7 magenta7 svart7

Javnaðarflokkurin:

Minkið blokkin 100 milliónir

Sambært búskaparligum útrokningum, ið Javnaðarflokkurin kallar bjartskygdar, kollsiglir føroyski búskapurin eftir fáum árum, um ríkisveitingin verður minkað eftir leisti landsstýrissins. Tí mælir flokkurin til, at farið verður varligari fram

RÍKISVEITINGIN
John Johannessen

Tað er einans ráðiligt at skerja ríkisstuðulin við 100 milliónum á komandi samráðingum við danir. Verður ríkisstuðulin minkaður burtur eftir leistinum hjá landsstýrinum, kollsiglir føroyska samfelagið eftir fáum árum.

Hetta er niðurstøðan hjá Javnaðarflokkinum, eftir at hann hevur latið ein búskaparfrøðing rokna uppá sjálvstýrisætlanina hjá samgonguni. Og Javnaðarflokkurin skýrir harafturat útrokningarnar at vera bjartskygdar.

– Vit hava við vilja latið vera við at mála ein ávísan á veggin, men kortini endar tað so galið, sum vit síggja her, segði Jóannes Eidesgaard, tá hann legði roknistykkið fram.

Galið í 2005

Sambært útrokningunum hjá Javnaðarflokkinum verður gjaldførið hjá landskassanum negativt longu í 2005, um blokkurin verður skorin burtur eftir leistinum hjá landsstýrinum.

Landsstýrið ætlar, at ríkisstuðulin skal minkast burtur eftir fýra árum, frá 600 milliónum í 2002 til 150 milliónir í 2005, og síðani skal hann vera burtur í 2006.

Og sambært útrokningunum hjá Javnaðarflokkinum førir hetta til, at føroyski landskassin hevur ein gjaldføristørv, ið er oman fyri 6 milliardir í 2013.

Skulu hava sjálvberandi búskap

Javnaðarflokkurin sigur seg ikki vera ímóti, at føroyingar miðja eftir at fáa ein sjálvberandi búskap, men hann vil ikki, at hetta skal kosta vælferðina hjá einstaka borgaranum.

– Vit prioritera búskaparligt frælsi. Ætlanin hjá landsstýrinum forkemur bæði vælferðini og búskapinum, segði formaður Javnaðarflokksins, tá hann í gjár legði roknistykkið um avleiðingarnar av ætlanini hjá landsstýrinum fram fyri fjølmiðlunum.

Men Jóannes Eidesgaard heldur ikki, at tað forkemur vælferðini og búskapinum, um ríkisveitingin verður skorin við 100 milliónum krónum komandi ár. Tí mælir hann til, at landsstýrið fer til samráðingar um at skerja ríkisveitingina við 100 milliónum í staðin fyri við 300 til 400 milliónum, eins og landsstýrið ætlar.

Eitt ár í senn

Harafturat heldur Javnaðarflokkurin tað ikki vera ráðiligt at legga sær eina fasta ætlan fyri, hvussu blokkurin skal minka, eins og landsstýrið hevur gjørt.

– Vit skulu taka eitt ár í senn, og síðani hyggja at tjóðarframleiðsluni og minka blokkin eftir tí lutfalli, hon veksur, sigur Jóannes Eidesgaard.

– Tað er ikki ábyrgdarfult at leggja út í kortið fyri næstu tólv árini. Vit mugu ásanna, at vit liva í einum fiskivinnusamfelag, og at føroyski búskapurin gongur upp og niður, segði Jóannes Eidesgaard á tíðindafundinum og vísti á tíðindini, vit júst hava hoyrt um, hvussu illa tað stendur til við svartkjaftinum.

Í sama sambandi vísti formaður Javnaðarflokksins á kreppuna í nítiárunum, tá toskurin hvarv og fiskaprísirnir samstundis fóru í botn.

Og júst av hesum orsøkum skýtur Javnaðarflokkurin upp, at lutfall skal verða sett ímillum vøksturin í føroysku tjóðarframleiðsluni og einari minking í ríkisveitingini, soleiðis, at ríkisveitingin minkar, so hvørt tjóðarframleiðslan økist.

Signar á Brúnni:

Tjóðveldisflokkurin sveik

Signar á Brúnni fekk heldur ikki hesaferð tilboð um at koma aftur í landsstýrissessin, sum hann upprunaliga ætlaði. Hetta hevur fingið hann at skriva hvassorðaða viðmerking í Sosialin móti flokki sínum

LANDSSTÝRISSESSUR
John Johannessen

»Hevur hann ikki gjørt nakað skeivt, so eigur støðan at verða nullstillað og Signar á Brúnni settur í landsstýrisstarvið«.

Soleiðis segði Høgni Hoydal við Sosialin, tá Signar á Brúnni valdi at fara frá sum landsstýrismaður, orsakað av, at ivi var sáddur um embætisførslu hansara, tá hann játtaði Sjónvarpinum pening.

Hetta brotið velur Signar á Brúnni at endurgeva í hvassari viðmerking, hann hevur sent Sosialinum um flokk sín.

Signar á Brúnni heldur, at Tjóðveldisflokkurin hevur svikið seg

Svikin

Viðmerkingin frá Signari á Brúnni, sum er prentað aðrastaðni í blaðnum, sýnir heilt greitt, at hann kennir seg svikin av floksfeløgum sínum, og at hart stríð er innanhýsis í Tjóðveldisflokkinum.

»Nú nýggjur landsstýrismaður í mentamálum er valdur, eru tað mong, ið hava spurt meg, hví eg ikki tók av tilboðnum um at fara í landsstýrið aftur, um orsøkin var hon, at eg ynskti ikki, at nú fráfarni landsstýrismaðurin ikki skuldi gerast tingmaður í mitt stað. Til hetta er at siga, at eg ikki havi fingið tilboðið, soleiðis sum mær varð lovað tann 28. mars ár 2000, tá eg segði meg frá sum landsstýrismann, orsakað av sjónvarpsmálinum«

»Tað eru einki tey, ið spyrja, um eg nú veruliga fekk hetta lyftið, ið eg havi nevnt fleiri ferðir. Eg skal enn einaferð taka uppaftur, at tað var mær lovað, og at tað var nógv frammi í fjølmiðlunum tá. Áhugavert er at lesa ymiskt av tí, ið tá varð sagt av m.ø. tjóðveldismonnum«, skrivar Signar á Brúnni.

Hetja

Svikni fyrrverandi landsstýrismaðurin vísir á ymiskt brot úr føroysku bløðunum og eina røðu hjá Óla Holm á landsfundi frá tíðini beint eftir, at hann fór frá. Hesi brot skýra hann at vera hetju, tí hann valdi at fara frá fyri at reinsa flokkin. Ein teirra, ið tá skýrdi Signar á Brúnni at vera hetju, var Tórbjørn Jacobsen, nú fyrrverandi landsstýrismaður.

Hetta sýnist alt rættiliga undarligt fyri Signar á Brúnni í dag. Tí í dag er hann alt annað enn hetja í Tjóðveldisflokkinum.

»Tað, sum undrar meg og onnur tjóðveldisfólk er, hvussu tað ber til, at hendan hetjan Signar, ið tit tá gjørdu hann til, ikki verður eftirspurdur, nú ið boð vóru eftir tí fjóðra landsstýrismanninum í mentamálum undir sitandi samgongu. Málsøkið kennir hann. Tað, ið er hent síðani Høgni úttalaði seg fyri Sosialinum, Óli helt formansfrágreiðingina og Tobbi skrivaði um sjónvarpsmálið er, at Signar á Brúnni er reinsaður fyri tær skuldsetingar, settar vóru ímóti honum«.

»Hetta má væl merkja tað, at tann stóra hetjan, ið tit gjørdu Signar til á vári 2000, má vera uppaftur størri, eftir at verða reinsaður. Hvussu ber tað nú til, at Høgni og Óli leypa frá tí avtalu, ið gjørd varð tann 28. mars ár 2000, væl stuðlaðir av Tórbirni?«, spyr Signar á Brúnni í viðmerking í Sosialinum í dag.

Signar á Brúnni sigur seg hava skrivað viðmerkingina eftir, at hann hevur fingið fleiri fyrispurningar frá fólki, um hví hann ikki gjørdist landsstýrismaður aftur.

Javnaðarflokkurin:

Útrokningarnar eru bjartskygdar

Javnaðarflokkurin sigur seg við vilja hava nýtt bjartskygdar fyritreytir í búskaparligu framrokningunum av ætlanum landsstýrissins

RÍKISVEITINGIN
John Johannessen

Við einum búskaparvøkstri á 2 prosent árliga og útreiðslum á 1,5 prosent verður gjaldføri landskassans negativt longu í 2005.

Hetta er úrlslitið av búskaparligu framrokningunum hjá Javnaðarflokkinum av sjálvstýrisætlanini, og Javnaðarflokkurin kallar tær í so bjartskygdar.

– Vit valdu við vilja at gera fortreytirnar bjartskygdar fyri at geva útrokningunum eitt betri trúvirði, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarflokksins.

Vøkstur verður hægst 2 prosent

Javnaðarflokkurin heldur, at tað er í hægra lagi at rokna við einum árligum inntøkuvøkstri á 2 prosent realt. Hetta grundgevur hann við millum annað at sameta við ES lond, sum í miðal hava havt ein inntøkuvøkstur á 1,74 prosent síðani 1990.

Samstundis vísir Javnaðarflokkurin á, at Føroyar í veruleikanum ikki hava havt nakran inntøkuvøkstur síðani 1990. Hetta ger hann greitt við at vísa á, at føroyski búskapurin síðani kreppuna nú er komin í upp á sama stig, sum hann var í 1990. Orsøkin til, at vit kortini hava merkt ein øgiligan vøkstur seinastu árini er, at vit hava merkt ein vøkstur síðani kreppuna. Men vit hava ikki merkt ein vøkstur síðani 1990, greiðir Javnaðarflokkurin frá.

Landsstýrið hevur fleiri ferðir víst á, at Føroyar hava havt ein sogguligan búskaparvøkstur á 3,7 prosent síðani 1962.

Men Javnaðarflokkurin vísir á, at hetta er orsakað av, at seksti árini vóru serlig ár fyri føroyska búskapin. Tað var tá, at føroyski búskapurin tók seg upp á ein ídnaðarligt menningarstig, og tá øktist virksemið nógv saman við útbyggingini av almanna-, heilsu- og útbúgvingarverkinum, eins og privatu tænastuvinnunnar øktist. Harafturat vísir Javnaðarflokkurin á, at tað var í hesum tíðarskeiðnum, at kvinnurnar fóru út á arbeiðsmarknaðin.

– Slík menningarstig kunnu sambært búskaparfrøðini bert henda einaferð, sigur Javnaðarflokkurin.

Javnaðarflokkurin vísir á, at búskaparvøksturin í Føroyum seinastu 20 árini hevur verið 2 prosent árliga.

Útreiðsluvøksturin er hægur

Í útrokningum sínum hevur Javnaðarflokkurin valt at seta útreiðsluvøksturin at vera 1,5 prosent um árið komandi árini, hóast hann heldur hetta vera í so lítið.

Samgongan hevur í sínum útrokningum sett útreiðsluvøksturin at vera 0,8 prosent.

Men hetta heldur Javnaðarflokkurin vera heilt burturvið.

»Hetta er púra órealistiskt, tá hugsað verður um, hvussu tað hevur eydnast landsstýrinum at tálma útreiðslunum tær tríggjar fíggjarlógirnar, tað hevur havt ábyrgdina av. Hesi trý árini eru útreiðslurnar øktar við umleið 600 milliónum, svarandi til heili fimm prosent um árið«, sigur Javnaðarflokkurin.

Og Javnaðarflokkurin vísir eisini á onnur dømi:

»Eitt annað dømi um, hvussu órealistiskt tað er at rokna við einum útreiðsluvøkstri undir eitt prosent er, at skulu vit veita tí vaksandi tali av okkara gomlu borgarum bert nøkulunda mannsømilig kor á dagsins støði, vil hetta einsamalt økja um landskassans útreiðslur árliga við umleið hálvum prosenti árliga«, sigur flokkurin.

Eisini vísir Javnaðarflokkurin á, at tað ikki ber til at rokna við, at útreiðslunar ikki skulu økjast meira enn 0,8 prosent, tá landsstýrið hevur ætlanir um stórar íløgur í skip og tunlar, eins og lønarsáttmálar eru gjørdir, ið geva ein mettan realan lønarvøkstur á í mista lagi 3 prosent komandi árini.